## DAGSINS MEINING

# Veljarakanning og um at dumma seg

Veljarakanningar skulu sjálvsagt altíð takast við hóskandi fyrivarnum, men kunnu tó geva eina ábending, hvussu rákið er. Tað áhugaverda er ikki bert sjálv kanningin, men viðhvørt er tað ógvuliga læruríkt at siggja, hvussu fólk reagera uppá úrslitið av slíkum kanningum.

Samgongan fær eitt herðaklapp í seinastu veljarakanningini, sum Gallup hevur gjørt fyri Útvarpið við tað, at hon stendur til at økja meirilutan frá 21 tinglimum til 23. Hetta merkir, at tann einasti stóri flokkurin, ið ikki er í samgongu, hóast framgongd, er uppaftur meiri isoleraður frá meirilutanum. Hvussu svarar so stóri andstøðuflokkurin, tá hann verður biðin um at viðmerkja seinastu veljarakanning? Finnir hann tær diplomatisku vendingarnar fram? Rættir hann hondina út til samstarv? Nei, hann tosar um, at flokkurin hjá Løgmanni fær framgongd, tí at hann hevur dummað seg minst í samgonguni. Eitt ógvuliga sigandi úttalilsi, ikki fyri samgonguna, men sigandi fyri hvussu flokkurin, ið setti daggskránna við buldri og braki seinastu fimm árini, reagerar, tá hann ikki longur sleppur at seta dagsskránna í almenna kjakinum.

Ikki kann sigast, at viðmerkingin, um at hava dummað seg, er tann mest búni mátin at viðmerkja eina veljarakanning, ið ikki er, sum ein kundi ynskt. Spurningurin er, um ikki slíkur hugburður frá Tjóðveldisflokkinum júst er orsøkin til, at hann er í tí isoleraðu støðu sum hann er.

Svart hvíti politikkurin, har tað mest snúði seg um fullveldi ella einki, eydnaðist ikki sum ætlað, men tað tykist sum hesin veruleiki hevur ringt við at treingja ígjøgnum hjá leiðsluni í hesum flokki, ið oftani tosar sum um, at hon umboðar ein meiriluta av Føroya fólki. Tað ger hon ikki, og havandi í huga føroysku skipanina, har stjórnarvald fæst gjøgnum samgongusamstarv, so hevði sama floksleiðsla helst staðið seg betur við eitt sindur av sjálvrannsakan og kanska roynt at tosað við tey í egna politiska baklandi, ið hava víst í verki, at mál kunnnu røkkast við samstarvi heldur enn konfrontatión. Um flokkurin ikki ger hetta er tað spell, ti tað ger føroyska politiska lívið eitt sindur fátakari, enn tað annars kundi verið.

Tað skal verða okkara vón, at samstarvsvilji fer at vinna á firtni og gangi, soleiðis at tíðin frá Heimastýrislógini til 1974 ikki fer at endurtaka seg, har Tjóðveldisflokkurin við einum einstøkum undantaki sat í andstøðu alla tíðina, tí at flokkurin ikki kundi samstarva við hinar føroysku flokkarnar. Samstarv og virðing hvør fyri øðrum, er lykilin til at kunna luttaka í stýringini av hesum landi. Harfyri eg ikki sagt, at man skal sleppa øllum sínum grundleggjandi sjónarmiðjum. Spurningurin er um at finna ta røttu javnvágina saman við øðrum. "Fordu(ø)mmandi" úttalilsi gagna ikki hesi gongd. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# SvF og bankasendingar

**Ivan Niclasen**
*SvF*



Johan Petersen hevur helst misskilt okkurt, tá hann í lesarabrævi leygardagin førir fram, at SvF villleiðir í bankamálinum.

Tí skal eg stutt spola aftur til bankasendingarnar. SvF sendi í 1997 tríggjar sendingar um bankamálið. Sendingarnar viðgjørdu hendingarnar í 1992 og partabrævaumbýtið í 1993, tá Føroyar snøgt sagt fóru á húsagang. Húsagangurin byrjaði við, at føroyska bankakervið brendi saman. Tí lænti Landsstýrið í 1992 og 1993 pengar frá donsku stjórnini, sum gjøgnum Fíggingargrunnin, fóru inn í føroyska bankarenslið. Talan var um 2.7 miljardir krónur. Tað var hesa upphædd eg sipaði til í annonseringini til bankasendingarnar, sum vit endursendu í vikuni. Føroyar livdu við hesi avtalu til 1998, tá ein nýggj avtala varð gjørd, og Føroyar fingu eitt endurgjald áljóðandi 1,5 miljardir krónur.

Politiskar sendingar?
Johan Petersen sigur víðari í lesarabrævinum, at bankasendingarnar høvdu politiskt sikti. Tað er harmiligt, at júst Johan fer upp í tað kórið, sum heldur, at sendingarnar vóru politiskt bílagdar. Johan var ein skilagóður formaður í táverandi politiskt valdu sjónvarpsnevndini. Tí veit hann helst eisini, at bankasendingarnar heilt einfalt vóru eitt úrslit av einum journalistiskum ynski um at koma til botns í bankamálinum, í partabrævaumbýtinum og í spurninginum um Føroyabólkin. Hetta vóru mál, sum vóru nógv frammi tá, og tað hevði verið løgið um ein fjølmiðil púra tagdi hesu evnir burtur.

Leiðslan í SvF hevði eisini fult álit á, at teir báðir Høgni Hoydal og Ronnie Thomassen gjørdu sítt arbeiði til lítar. Eftirfylgjandi kundu vit eisini siga, at tað gjørdu teir. Bankasendingarnar vóru tríggjar dokumentarsendingar gjørdar út frá teimum fyritreytum og tí vitan, vit høvdu í 1997.

Men - tað er greitt, at slík evnir høvdu ovurstóran politiskan áhuga. Til løgtingsvalið í 1998 vóru fleiri politiskir flokkar eisini altráir eftir at fáa hesi fjølmiðlafólk á listan. Og sjálvandi høvdu bankasendingarnar og Grønborgkanningin avgerandi ávirkan á valið. Tað verður heldur ikki seinastu ferð, at nýggj vitan ella eldfimar frágreiðingar hava avgerandi ávirkan á eitt val. Og somuleiðis er tað hvørki fyrstu ella síðstu ferð, at ein fjølmiðlamaður, sum hevur gjørt vart við seg í einum politiskt viðbreknum evni, ger eitt gott val. Men her eiga journalistikkur og politikkur ikki at koma í bland, um ein so eftirfylgjandi er samdur við politikkaranum Høgna Hoydal ella ei.

**Bankasendingar og Grønborg**
At enda kann eg leggja afturat, at júst bókin hjá Richard Mikkelsen, sála, frá 2001, stutt nevnir bankasendingarnar og Grønborg-kanningina. Og her staðfestir ein heldur uppgevandi Richard Mikkelsen, at Grønborg kanningin í ein stóran mun váttaði upplýsingarnar í bankasendingunum hjá SvF.

# Jógvan Arge í fastasta svøvni

**Heðin Mortensen**
*formaður í mentanarnevndini*



Síggi í bløðunum, at Jógvan Arge - honum so líkt - kemur við negativarum viðmerkingum til býráðsarbeiðið. Hesaferð skrivar hann um strongda barnaansing, sjálvt um hann sjálvur situr í mentunarnevndini og viðger barnaansingartørvin, og tí skuldi verið væl kunnaður í hesum máli.

Jógvan Arge, kommunan kroystir ikki fleiri børn inn á stovnarnar, enn teir er normeraðir til. Hesi tøl og yvirlit yvir stovnar hevur tú fingið á hvørjum ári í hondina, tá viðgerðin av fíggjarlógini hjá kommununi hevur verið fyri.

Seinast tú fekst hesi tøl, var á mentunarnevndarfundi týsdagin í síðstu viku, men kortini skrivar tú, at tú einki kennir til hesi viðurskifti. Hetta dugi eg ikki at lesa á annan hátt, enn at tú vilt varpa um allar geilar, at tú hevur sovið í tímanum.

Í hesu setuni hevur býráðssamgongan bygt níggju nýggjar vøggustovur og barnagarðar. Ongantíð í býráðsins søgu eru so stórar íløgur lagdar á einum stað. Ansingartøvurin er í dag nøktaður, og øll foreldur hava nú møguleika at fáa ansing fyri sínum børnum, soleiðis at møguleiki er fyri at koma út í vinnu.

Og meira er á veg, tí longu fyri komandi ár eru tríggir nýggir stovnar á veg í Nólsoy, á Velbastað og í Hoyvíkshaganum Suður. Men hetta hevur Jógvan Arge ongan áhuga í, tí nú er einki mál at rumbla við.

Tú mást bara síggja sannleikan í eyguni, at málið er rokkið og avgreitt, Jógvan. Her er einki at koma eftir!

Nú hetta valskeiðið er farið at halla, er nógv at vísa á, sum er framt á nógvum økjum. Enn er sjálvandi nógv eftir at gera, og í mínari verð verður størsta takið í næstu setu at fáa loyst ansingar- og røktartørvin hjá okkara eldru á líka fyrimyndarligan hátt, sum vit hava loyst barnaansingina.

Tey, ið hava lagt lunnar undir tað, vit onnur kunnu byggja víðari á, standa nú fyri tørni, og tí eiga vit at leggja allar kreftir og neyðuga peningin í hetta økið. Vit eru eisini longu væl á veg við Tjarnargarði og víðari útbygging av honum, eins og heimið í Vallalíð kann nevnast.

Nú haldi eg, at stundin er komin, at Jógvan Arge eisini smoyggir upp um armar og ger seg til reiðar at vera við í arbeiðinum, heldur enn altíð at vera við tað ringa orðið, tí tað tænir ongum endamáli. Tað mátti verið so líka til, at Jógvan Arge frøddist um, at ansingartørvurin varð loystur í hesi setuni, men her haltar hjá Jógvan Arge, tíverri.

At enda havi eg eini ráð at geva tær, Jógvan Arge. Eg haldi ikki, at tú skalt leggja eftir okkara umsiting í hesum máli, tí hon kann á ongan hátt lastast fyri, at tú ikki fylgir nóg væl við!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Barnaansingartørvurin er loystur við nýggjum stovnum

## Viðmerking til lesarabræv frá starvsfólkunum á Dagstovninum í Hoyvík 11. september

**Gunnleyg Durhuus**
*trivnaðarstjóri*



Av tí at fleiri viðurskifti í lesarabrævinum hjá starvsfólkunum á Dagstovninum í Hoyvík ikki eru í tráð við veruleikan, vil eg gera nakrar fáar viðmerkingar.

Tað er ikki rætt, tá ført verður fram, at Tórshavnar býráð hevur koyrt eyka børn inn á verandi stovnar fyri at nøkta barnaansingartørvin. Tørvurin er loystur við at bygdir eru fleiri nýggir dagstovnar, bæði í Tórshavn, í Kollafirði og í Kalbak.

Av skrivinum fær ein ta fatan, at teir flestu stovnarir hava tikið fleiri børn inn enn teir rúma og er tað beinleiðis skeivt.

Tórshavnar kommuna hevur 33 dagstovnar í dag, og teir flestu av stovnunum hava sama tal av børnum í ár, sum teir høvdu síðsta ár. At nakrir stovnar hava tikið fleiri børn inn í ár enn síðsta ár, og aðrir stovnar hava færri børn í ár er orsaka av broyttum aldursbýti á stovnunum.

Tá teir nýggju stovnarnir vórðu tiknir í nýtslu, varð eisini talið av dagrøktarum minkað, so kommunan hevur ongantíð havt ætlan um ella tørv á at koyra fleiri børn inn í verandi stovnar, og enn minni at trýsta nakran stovnsleiðara.

Eru viðurskifti á einum stovni íkki í lagi, er tað stovnsleiðarin, ið hevur ábyrgdina av at skipa viðurskiftini soleiðis, at tey eru nøktandi. Kann hetta ikki lata seg gera, eigur leiðarin at venda sær til kommununa um nevndina fyri stovnin, so trupulleikin verður loystur.

Sagt verður, at aldurin á vøggustovubørnum er farin frá 3 1/2 ár til 2 1/2 ár. Hetta er ikki rætt, tí aldurin er lækkaður við 3 mánaðum og ikki 1 ári. Orsøkin er, at børn, ið fylla 3 ár millum 1. januar og 31. desember nú verða mett sum barnagarðsbørn, bæði hvat gjaldi og normering viðvíkur, meðan markið fyrr varð 1. oktober.

Sambært skrivinum verður ásetingin, sum stovnurin hevur havt í 20 ár, broytt, og sagt verður at ov fá starvsfólk eru til børnini. Broytingin í barnatalinum á stovninum er innan fyri upprunaligu normering, av tí at tað nú eru fleiri barnagarðsbørn í mun til vøggustovubørn. Starvsfólkanormeringin á stovninum er hækkað munandi hesi 20 árini, so viðurskiftini eru væl betur nú, enn tey vóru fyri 20 árum síðani. Annars hevur Dagstovnurin í Hoyvík somu normering sum hinir stovnarnir í kommununi.

Nevnast kann, at umstøðurnar á dagstovnunum í Tórshavnar kommunu eru betur enn í fleiri av okkara grannalondum, bæði viðvíkjandi bygningum og starvsfólkanormeringum, so tað er ikki rætt, tá sagt verður, at kommunan ikki vil rinda tað, sum tað kostar at byggja og reka ein góðan stovn.

Tórshavnar býráð vil framhaldandi tryggja børnum, foreldrum og starvsfólkum eina vælvirkandi barnansingarskipan, sum skapar trivnað og menning.

# Býráðsarbeiði er eisini politikkur

**Hildur Eyðunsdóttir**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin í Tórshavnar kommunu:*



***Býráðspolitikkur í størri kommununum er eins nógv flokkspolitikkur sum landspolitikkurin, og tað eigur hann eisini at vera.***

***Vit skifta ikki yvir í vinstru síðu tá vit koyra av landsvegi inn í bygt øki, og líka lítið skifta vit politiska hugsjón tá vit flyta okkum av einum politiskum palli til annan.***

Tað er ikki óvanligt at hoyra fólk siga, at býráðsval er meira persónligt enn løgtingsval, við tí grundgeving, at býráðsarbeiði er ikki so politiskt sum løgtingsarbeiði. Tað er óiva rætt, at tað hevur verið so, og er tað enn í teimum smærri kommununum, men hetta er ikki í sama mun galdandi í Tórshavnar kommunu. Kommunurnar í Føroyum eru, í stóran mun, á veg til at fáa sama leiklut sum í hinum Norðanlondunum, har tað í størri mun eru kommunurnar og ikki landið, sum røkja tær uppgávur sum beinleiðis viðvíkja borgaranum. Landsmyndugleikarnir stinga tær stóru linjurnar út í kortið, og seta kommununum lógarkarmar at virka eftir, men innan hesar karmar er tað í stóran mun upp til kommunurnar sjálvar, at gera av hvussu tær loysa uppgávurnar. Og tað er fyri ein stóran part hesar avgerðir, hesin politikkur, sum borgarin merkir í gerandisdegnum.

**Leikluturin hjá tí almenna**
Eins og í landspolitikkinum, eru tað í kommunalpolitikki ymiskar áskoðanir um hvønn leiklut tað almenna skal hava. Summi meina, at tað almenna skal hava so lítlan leiklut sum møguligt, og heldur lata tað upp til borgararnar og tann privata marknaðin at loysa uppgávurnar. Onnur halda, at tað almenna skal verða virki og tryggja øllum borgarum tænastur á samhaldsføstum grundarlagi.

Soleiðis eru vit øll við til at fíggja t.d. barnaansingarøkið yvir skattin, uttan mun til um hin einstaki hevur børn ella ikki, á sama hátt sum vit øll gjalda fyri almenn parkeringspláss, svimjuhylar og burturbeining av vespum.

Hetta nýtist sjálvandi ikki at vera so. Tað hevði eisini borið til at goldið brúkaragjald fyri nógvar almennar tænastur og kommunan kann eisini velja um hon skal reka tænastuna sjálv ella leggja hana út til privat vinnurekandi at reka, tó fíggjað við skattakrónum. Hetta eru, fyri stóran part hugsjónarlig val, og so hvørt sum øki verða løgd út til kommunurnar, fer hugsjónarpolitikkurin at gerast alt meira sjónligur, eisini kring landið.

Men longu í dag hevur hugsjónarpolitikkurin, flokkspolitikkurin, nógv at siga. Um tú heldur tað hava týdning at hava eina vælútbygda almenna ferðslu, so mást tú velja flokkar og politikkarar sum leggja dent á almenna ferðslu.

Á sama hátt er tað ein politisk og hugsjónarlig avgerð, um býráðið skal seta krøv til bygging fyri at tryggja ávíst støði, ella um hvør byggiharri skal sleppa at gera sum hann vil, eins og tað mangan tykist í dag. Tað eru eisini politiskar avgerðir, sum gera av, um vit hava eina nóg væl mannaða umsiting, um vit leggja í at arbeiða virki við umhvørvispolitikki, bústaðarpolitikki, sosialpolitikki o.s.fr.

Tórshavnar kommuna hevur eina fíggjarætlan sum javnvigar við knappa hálva milliard. Her eru hundraðtals milliónir krónur sum verða raðfestar í kommununum eftir politiskum hugsjónum. Og hví ikki. Eg haldi tað er løgið at hugsa sær, at flokkar sum brenna fyri einum hvørjum øki í landspolitikki, skuldi slept endanum tá sama øki verður viðgjørt í kommununum.

**Kommunalur vinnupolitikkur**
Fyrr vóru kommunurnar ógvuliga virknar í vinnupolitikki, alt ov virknar. Tær áttu í flakavirkjum og skipum, og royndu á tann hátt at skapa livilíkindi í kommununum. Tað ber ikki til longur. Kommunurnar leiklutur í dag er heldur, at skapa karmar fyri einum góðum vinnulívi. Eisini á hesum øki eru flokkar og politikkarir ójavnir á máli um, hvønn leiklut kommunan skal hava, og hvørja vinnuliga menning birtast skal uppundir. Tjóðveldisflokkurin meinar, at ein tann besta vinnuliga menningini fæst í býum har fólkið trívist. Tað vil siga at býurin skal skipast menninskjaliga, hugnin skal ikki víkja fyri virkjum, og fótgangarir og súklandi skulu ikki kroystast burtur av tungari ferðslu. Men ein livandi býur er eisini ein virkin býur. Sjálvandi skal vinnan hava góðar karmar, men vit skulu tora at seta vinnuni krøv, og vit skulu hava dirvi altíð at leggja stórsta dentin á trivnaðin.

Tað er tí í øllum býráðspolitikki ein spurningur um hvønn leiklut tað almenna skal hava. Borgarligu flokkarnir halda fyri, at tað er vinnulívið sum heldur øllum samfelagnum uppi, og at vit øll liva av teimum sum taka aktivan lut í vinnuni. Eg haldi ikki tað er heilt so einfalt. Heldur er tað so, at vit øll liva og mennast saman og hava øll gagn av hvørjum øðrum. Tað er ikki av tilvild, at Norðurlendsku vælferðarsamfeløgini eru tey sum hava besta búskapin, og fremstu vinnuligu menningina. Tí hava vit eisini sæð, at vinnulívið setur krøv til kommunurnar um t.d. at fáa dagstovnapláss, so foreldrini kunna sleppa til arbeiðis. Og vinnan leggur seg har, sum trivnaðurin yvirhøvur er bestur. Har sum arbeiðsfólk fáa møguleikar at búgva sum tey ynskja, har sum barnaansingarøki er væl skipað, við tørvinum hjá barninum í sentrum, har sum skúlarnir eru góðir og vælútgjørdir, har sum mentunarlívið hevur góðar karmar at mennast, har sum góðir karmar eru fyri frítíðarvirksemi fyri bæði børn og ung, og har sum børn, vaksin og gomul kunnu ferðast trygg. Alt umstøður sum krevja politiska støðutakan.

# Bìðilistin burtur og hvat so?

**Starvsfólkið á Dagstovninum í Hoyvík**

Eftir at hava hoyrt býráðsformannin, Jan Christiansen, úttala seg í Útvarpi Føroya um, at bíðilistin er burtur, vilja vit gjarna gera nakrar viðmerkingar.

Vit fegnast um, at býráðið hevur raðfest at fáa fleiri stovnar, og at man hevur sett sær sum mál at fáa bíðilistan burtur. Vit eru tó sera hørm um mátan, býráðið hevur valt at røkka hesum málum.

Tað undrar okkum, at ongin setur spurnartekin við, **hvussu** Tórshavnar Býráð hevur fingið bíðilistan burtur.

Hóast fleiri stovnar eru bygdir, hevur býráðið óbeinleiðis trýst nakrar stovnsleiðarar at taka fleiri børn inn, enn normeringin og trygdin loyvir.

Víkir man frá vanligum mannagongdum og ásettum normum, bert fyri at røkka sínum vallyftum?

Eitt nú eru stovnar ið hava havt eina áseting í 20 ár, sum nú brádliga verður broytt. Hvussu ber tað til, at tað í ár rúmast fleiri børn inni á stovnunum enn undanfarin ár? Ella hvussu kann ein nýggjur stovnur hava eina áseting í fjør, og eina aðra í ár?

Hvussu kann man, sum starvsfólk vita, hvørjar treytir, man er settur undir?

Eisini hevur býráðið broytt vøggustovualdurin til 2 1/2 ár - ístaðin fyri 3 1/3 ár! Hetta førir við sær, at býráðið sparir nógvar pengar. Spurningurin er bara, hvat hetta hevur at siga fyri børnini.

Tað undrar okkum, at býráðið velur at gera so stórar broytingar uttan at tryggja sær at tørvurin hjá børnunum verður settur í hásæti. Eftir okkara tykki er tað stórur munur á at vera 2 1/2 ár og 3 1/2 ár.

Nógv børn sum eru millum 2 1/2 og 3 1/2 ár brúka blæu og hava tørv á at sova um dagin. Tey hava trupult við at lata seg úr og í klæðir sjálvi, og hava tørv á tættari vaksnum sambandi enn børn, sum eru eldri. Ikki øll børn í hesum aldri hava eitt nóg gott mál til at kunnu siga, hvat teimum tørva og hvørji ynski tey hava. Tey hava ikki bindindi at sita og lurta, ella fata tá felags boð verða givin. Ferðin er ein onnur í barnagarðinum og kappingin er ógvuliga hørð um tey fáu vaksnu, sum eru í barnagarðinum. Eitt nú er tað uml. 1 vaksin til 3,3 barn í vøggustovum, ímeðan tað í barna-gørðum er uml. 1 vaksin til 6,8 barn.

Tí meta vit hesa broyting vera pedagogiskt óforsvarliga, um hugsað verður um ta sunnu menningina og trivnaðin hjá barninum.

Vit vita, at Tórshavnar Býráð hevur ein trivnaðarleiðara, men vit kundu hugsað okkum at vita, hvørja uppgávu hesin leiðarin hevur. Eftir okkara tykki verður als ikki tikið støði í trivnaðinum - hvørki hjá børnum ella vaksnum, ið hava sín gerandisdag á hesum stovnum!

Vit pedagogar og hjálparfólk, sum eru um hesi børnini í gerandisdegnum, vilja við hesum gera vart við, at tað ikki er nøktandi at byggja fleiri stovnar, um man ikki vil raðfesta at gjalda fyri tað, sum tað kostar at skapa trygd og trivnað á hesum stovnum.